Kristian Joensen[1]

Eru Cookoyggjar og Niue statir eftir altjóðarætti?

Úrtak

Henda greinin viðger spurningin um statshugtakið við serligum atliti til um Cookoyggjar og Niue eru statir eftir altjóðarætti. Høvundurin førir fram, at spurningurin, um Cookoyggjar og Niue eru statir, kann býtast í fýra undirspurningar, um londini eru statir de-jure ella de-facto eftir ávíkavist altjóðarætti og stjórnarrætti. Víðari førir høvundurin fram, at svarið valdast, um spurt verður útfrá sjónarhorninum á antin deklaratorisku ella konstitutivu fatanini av, hvønn týdning viðurkenning frá øðrum statum hevur á statshugtakið.

Abstract

This essay examines the topic of statehood exemplified by the question of whether the Cook Islands and Niue are states according to international law. The author posits that the question of statehood with respect to these two territories can be categorized into four sub-questions: whether or not they have respectively de-facto or de-jure statehood under either international law or constitutional law. The author further argues that the answer depends on wheter you take the declaratory view or the contitutive view on the importance of state recognition.

1 Námslektari í løgfrøði og MA í lóg á Fróðskaparsetri Føroya.

1. Inngangur

Í hesari greinini fari eg at viðgera spurningin um statshugtakið við serligum atliti til, um serstøku eindirnar Cookoyggjar og Niue eru statir eftir altjóðarætti.

Fyrst fari eg at viðgera treytirnar, ið altjóðarættur setur, fyri at ein eind kann metast at vera ein statur. Í hesum sambandi komi eg inn á tvey ráðandi ástøði í altjóðarætti, ið hava serligan týdning fyri spurningin. Talan er um sokallaðu *deklaratorisku* fatanina og *konstitutivu* fatanina. Tað, sum skilur hesar fatanirnar, er leikluturin, sum viðurkenning frá øðrum statum hevur á nevnda spurning.

Síðani fari eg at viðgera serligu ríkisrættarstøðuna hjá Cookoyggjum og Niue, har eg fari at umrøða, hvussu henda støðan er ment við tíðini.

At enda meti eg um, hvørt Cookoyggjar og Niue kunna roknast at vera statir sambært treytunum í altjóðarætti.

2. Statshugtakið í altjóðarætti

Søguliga sæð hava sum nevnt tvær fatanir havt serligan týdning fyri, hvat skal til fyri at ein politisk eind kann sigast at verða eina statur eftir altjóðarætti. Talan er um *deklaratorisku* fatanina og *konstitutivu* fatanina. Sambært *deklaratorisku* fatanini er ein statur til óheft av, um aðrir statir viðurkenna hetta ella ikki. Ein viðurkenning er sostatt bert ein staðfesting av einum veruleika, ið finst frammanundan viðurkenningini.

Tann *konstitutiva* fatanin er hinvegin, at tað er viðurkenningin, ið skapar ein stat. Sostatt gerst ein politisk eind ella eitt løgdømi ein statur við tað, at aðrir statir viðurkenna hetta.[2] Hesar báðar fataninar hava ymiskar avleiðingar viðvíkjandi týdninginum av atlitum fyri at góðtaka eina eind sum ein stat. Eftir tí konstitutivu fatanini hava atlit ikki stóran týdning, tí at tað avgerandi er, um aðrir statir viðurkenna eindina.

Hinvegin hava slík atlit stóran týdning eftir deklaratorisku fatanini. Hetta leiðir til ein tørv at menna slík atlit. Gjøgnum tíðina hava stjórnar- og altjóðarættarkøn gjørt listar av slíkum atlitum.

2 William Thomas Worster, "Law, politics, and the conception of the state in state recognition theory", Boston University International Law Journal, [Vol. 27:115], 2009, s. 118.

Eitt skjal, ið hevur havt stóran týdning í hesum sambandi, er Montevideosáttmálin, ið nøkur amerikansk lond, harímillum USA, viðtóku í 1933. Grein 1 í sáttmálanum ljóðar soleiðis: [3]

> *The state as a person of international law should possess the following qualifications:*
> *(a) a permanent population;*
> *(b) a defined territory;*
> *(c) government; and*
> *(d) capacity to enter into relations with the other states.*

Montevideo sáttmálin[4] vrakar úttrykkiliga viðurkenning sum eitt atlit í grein 3, og kann sostatt sigast at hava eina deklaratoriska fatan av statshugtakinum. Til ber at seta spurnartekin við týdningin av Montevideo sáttmálanum. Talan er hóast alt um ein regionalan sáttmála, ið bert fá lond hava samtykt, og er hann ikki í sær sjálvum bindandi fyri flest lond í heiminum.

Hinvegin er sáttmálin eitt týðandi søguligt skjal, og umboðar tað ráðandi fatanina millum lond av altjóðarætti um hesa tíðina. Tað, at eitt stórveldi sum USA var ein av sáttmálapørtunum, gevur honum eisini ein týdning, sum hann neyvan hevði havt annars.

Atlitini í Montevideo sáttmálanum eru í øllum førum umboðandi fyri, hvørji atlit stuðlar av deklaratorisku fatanini hava sett fram í bókmentunum, og eru tey í stóran mun ein kodifisering av reglum, ið longu vóru viðurkendar frammanundan.

Hetta førir við sær, at fleiri av reglunum í sáttmálanum møguliga longu eru partur av sokallaða *jus cogens,* og harvið longu eru bindandi fyri altjóða samfelagið sum eina heild.[5]

Men hvussu skulu atlitini í sáttmálanum tulkast? Tað eru nógv løgdømi, ið liva upp til tey flestu ella enntá øll atlitini, men sum ongin hóast tað vildi sagt eru statir.

Hetta ger seg serliga galdandi fyri lond ella landaøki, sum hava nógv sjálvstýri, eisini viðvíkjandi uttanríkispolitikki, men sum framvegis tekniskt sæð eru partur av einum størri stati. Hetta ger tað týðandi at hyggja eftir møguligum

3 *Montevideo Convention on the Rights and Duties of States, 1933*, § 1, frá: www.ilsa.org/Jessup/Jessup15/Montevideo%20Convention.pdf (Seinast vitjað 14.11.2022).

4 Montevideo Convention 1933, § 3.

5 Ole Spiermann, *Moderne Folkeret, 3.* omarbejdede udgave, Jurist- og Økonomforbundets forlag, 2006, s. 17.

ræðisavmarkingum. Eru tað nakrar stjórnarrættarligar avmarkingar ella bindingar, ið forða løgdøminum at handla frítt?

Ein onnur treyt, sum nakrir høvundar hava sett fram fyri at viðurkenna eina eind sum ein stat eftir altjóða lóg er, lógligheit. Tað vil siga, at kravt verður, at politiska eindin, ið talan er um, skal vera stovnsett á lógligan hátt. Hetta vil eitt nú føra við sær, at eitt nú landøki, ið lýsa fullveldi sum úrslit av einari innrás ikki eftir hesari fatanini kunnu metast sum statir og harvið ikki hava tey rættindi, sum statir hava. Eitt nú sigur Thomas Grant í greinini *Defining Statehood: The Montevideo Convention and its Discontents* hetta um lógligheit:

> *In the 1950s and early 1960s, Lauterpacht (editing the Oppenheim treatise) and Cavaré (in his Droit International Public Positif) were not as bold as later writers would be in asserting international legality as a prerequisite to statehood; but their writings began to hint at the view, to develop in connection with the Rhodesian crisis of the 1960s and 1970s, that statehood, in addition to involving effective control, also required adherence to minimum international legal standards.*[6]

Hetta atlitið er eisini júst tað, sum aloftast forðar londum sum Taiwan og ymiskum landaøkjum undir ræði á uppreistrarbólkum at vinna sær viðurkenning sum statir. Tað sama ger seg galdandi fyri eitt nú Norðurkýpros.

Tað er eisini áhugavert fyri spurningin, um Niue ella Cookoyggjar eru statir, at tað er viðurkent, at altjóðarættur ikki hevur nakað krav til stødd.[7]

3. Støðan hjá Cookoyggjum og Niue
3.1 Cookoyggjar

Cookoyggjar hava havt eitt formligt tilknýti til Nýsæland síðani 1901, tá ið Nýsæland fekk Stórabretland at lata seg innlima oyggjarnar. Tá, ið ST varð stovnað í 1945, komu oyggjarnar á listan yvir ikki-sjálvstýrandi øki. Av hesi orsøk hevði New Zealand fráboðanarskyldu yvir fyri ST eftir grein 73(e) í stovningarsáttmálanum.[8]

6 Thomas D. Grant, "Defining Statehood: The Montevideo Convention and its Discontents", 37 Colum. J. Transnat'l L. 403 1998-1999

7 D. P. O'Connel siteraður í Grant 1999 s. 412

8 *Charter of the United Nations*, chapter 11, 1945, frá: www.un.org/en/about-us/un-charter/chapter-11 (Seinast vitjað 14.11.2022)

Sambært ST-aðalfundarsamtykt 1541 frá 1960, skuldu øll ikki-sjálvstýrandi øki fáa tríggjar møguleikar at velja í fyri at gerast sjálvstýrandi: [9]

1. *Stovnan sum ein sjálvstøðugan stat*
2. *Frælsan felagsskap við ein sjálvstøðugan stat*
3. *Innliman í ein sjálvstøðugan stat*

Tá ið eitt øki fær fult sjálvstýri, steðgar fráboðanarsskyldan.

Møguleiki 2 var ikki kendur áðrenn samtyktina, og tað, sum samtyktin segði um frælsan felagsskap, var ikki serliga ítøkiligt. Tað vóru bert fáar treytir: at skipanin var frívilliga vald á upplýstum grundarlagi, at økið hevði egna stjórnarskipan, innanhýsis sjálvstýri og rættin av sínum eintingum at broyta støðu seinni og skipa seg sum ein sjálvstøðugan stat.

Í 1965 var val á Cookoyggjum um framtíðarstøðuna. Í hesum sambandi samtykti Nýsælendska lóggávutingið Cook Islands Constitution Act, sum er karmalógin um nýggju skipanina hjá Cookoyggjum. Nýggja stjórnarskipanin varð viðløgd sum fylgiskjal til lógina. Orðingin um stjórnarskipanina var fylgjandi:

> *The Constitution set out in the Schedule shall be the Constitution of the Cook Islands and shall be the supreme law of the Cook Islands.*[10]

Henda lógin fekk gildi í 1965. Sama ár viðurkendi ST nýggju skipanina sum eitt dømi um frælsan felagsskap við ST-aðalfundar samtykt 2064, og sostatt helt fráboðanarskyldan hjá Nýsælandi uppat. [11]

Sum ST fataði skipanina í 1965, høvdu Cookoyggjar fingið fult internt sjálvstýri, men hvussu við uttanríkispolitikki? Karmalógin hevur í § 5 hesa áseting um uttanríkispolitikk:

9 UNGA 1541 (XV.), 15.12.1960, *Principles which should guide Members in determining whether or not an obligation exists to transmit the information called for under Article 73 e of the Charter*, frá: www.ilsa.org/Jessup/Jessup10/basicmats/ga1541.pdf (Seinast vitjað 14.11.2022)

10 *Cook Islands Constitution Act 1964*, frá: www.legislation.govt.nz/act/public/1964/0069/latest/whole.html#DLM354069 (Seinast vitjað 14.11.2022)

11 UNGA 2064 (XX), 16.12.1965, *Question of the Cook Islands*, frá: www.digitallibrary.un.org/record/203557/files/A_RES_2064%28XX%29-EN.pdf?ln=en (Seinast vitjað 14.11.2022)

> *Nothing in this Act or in the Constitution shall affect the responsibilities of Her Majesty the Queen in right of New Zealand for the external affairs and defence of the Cook Islands, those responsibilities to be discharged after consultation by the Prime Minister of New Zealand with the Premier of the Cook Islands.*[12]

Henda orðing leggur upp til, at uttanríkismál eru tað, sum vit í okkara skipan vildu kallað felagsmál. Men praksis, síðani nýggja skipanin varð innførd í 1965, hevur so líðandi víst eina aðra mynd. Cookoyggjar hava frá byrjan, men serliga síðani 1980, havt ein alsamt størri leiklut á uttanríkispolitiska økinum.

Cookoyggjar eru fullgildugir limir í fleiri altjóða og millumtjóða felagsskapum, hava bilateralar sáttmálar við fleiri lond og eru við í fleiri multilateralum avtalum. Alt hetta er gjørt í egnum navni og av egnum initiativi. Útyvir hetta hava Cookoyggjar eisini diplomatiskt samband við fleiri einstøk lond og ES sum felagsskap.[13]

Longu í 1973 við brævaskifti millum forsætisráðharrarnar í Cookoyggjum og Nýsælandi, staðfesti Nýsælendska stjórnin, at meiningin við § 5 í karmaógini var, at Nýsælendska stjórnin skuldi stuðla Cookoyggjum á uttanríkispolitiska økinum, men at stjórnin á oyggjunum var fræls til at føra sín egna politikk.[14] Lógarteksturin sjálvur nevnir, at uttanríkispolitiska ábyrgdin, sum formliga liggur hjá drotningini,[15] skal útinnast eftir ráførslu millum teir báðar forsætisráðharrarnar.[16]

Hvussu hetta virkar í praksis, er ST-sáttmálin um verju av osonlagnum eitt dømi um. Tá ið Nýsæland ratifiseraði sáttmálan av fyrstan tíð í 1987, varð boðað frá, at hann skuldi eisini galda fyri Cookoyggjar. Orsøkin var, at stjórnin í Cookoyggjum hevði biðið um hetta.

12 *Cook Islands: Constitutional Status and International Personality*. Legal Division, Ministry of Foreign Affairs and Trade, Wellington, Nýsæland, Mai 2005 (Seinast vitjað 14.11.2022)

13 Sí fótnotu 13.

14 *Voyage to Statehood: The Cook Islands Story*. Frá: www.web.archive.org/web/20151222081947/http:/www.cook-islands.gov.ck (Seinast vitjað 14.11.2022)

15 Nú konginum.

16 Henda orðing minnir um okkara egna Fámjinsskjal.

Í 2003 tóku Cookoyggjar sjálvstøðugt undir við sáttmálanum, og sum úrslit av hesum boðaði Nýsæland ST frá, at teir ikki longur mettu seg bundnar av sáttmálanum viðvíkjandi Cookoyggjum, tí at oyggjarnar nú sjálvar høvdu tikið hesa ábyrgd á seg.[17] Tað vil í fyrstu atløgu siga, at New Zealand ikki kann innganga sáttmálar fyri Cookoyggjar uttan teirra samtykki og í aðru atløgu, at Cookoyggjar hava fullan rætt sjálvar at innganga í slíkar sáttmálar av sínum eintingum og í egnum navni.

Tað, at hetta er fatanin hjá Nýsælandi, kom til sjónddar í fráboðan til ST í 1988. Sambært hesari fráboðan skuldu, altjóða sáttmálar inngingnir av Nýsælandi, ikki longur umfata Cookoyggjar.[18]

Í 2001 vóru 100 ár liðin, síðani Cookoyggjar komu undir Nýsælendskt vald. Sum partur av hátíðarhaldinum av hesum skrivaðu báðir forsætisráðharrarnir undir eina yvirlýsing um støðuna hjá Cookoyggjum. Tað eru serliga ásetingarnar í § 4 til 6 um uttanríkispolitikk og diplomatisk viðurskifti, sum hava áhuga.[19] Millum annað staðfestir § 4, at Cookoyggjar í sínum viðurskiftum við umheimin virka *as a sovereign and independent state*. Tað er áhugavert, at orðið *as* er valt í hesum samanhangi, tí hetta er nærum ein viðurkenning av Cookoyggjum sum sjálvstøðugum stati.

Hvørji eru so viðurskiftini, sum higartil hava sátt iva í altjóða samfelagnum og millum serfrøðingar, um Cookoyggjar er ein statur ella ikki?

Ein trupulleiki er spurningurin um ríkisborgararætt. Ein aðaltáttur við skipanini hjá Cookoyggjum er, at allir íbúgvarnir eru ríkisborgarar í Nýsælandi.[20]

17 Declaration and notes www.web.archive.org/web/20141011104855/http://ozone.unep.org/new_site/en/notes.php?country_id=125 (Seinast vitjað 14.11.2022)

18 Eg havi ikki funnið sjálva fráboðanina, men fleiri ymiskar keldur nevna hana. Eitt dømi um slíka er *"The Cook Islands and Free Association: Understanding the nature & practice of the special relationship with New Zealand"* hjá "Ministry of Foreign Affairs & Immigration" á Cookoyggjum, sum nevnir hesa fráboðan á síðu 3. Hetta skjal er at finna her: www.web.archive.org/web/20160214141625/http://www.mfai.gov.ck/attachments/article/233/Summary%20Sheet%20NZ%20and%20CKI.pdf (Seinast vitjað 14.11.2022)

19 *Joint Centenary Declaration of The Principles of the Relationship between the Cook Islands and New Zealand*, 2001, frá: www.mfat.govt.nz/assets/Countries-and-Regions/Pacific/Cook-Islands/Cook-Islands-2001-Joint-Centenary-Declaration-signed.pdf (Seinast vitjað 14.11.2022)

20 Sí fótnotu 17.

Hetta er millum annað ein av orsøkunum til, at løgdeildin í Nýsælendska uttanríkisráðnum í 2005 segði:

> *The maturity of the Cook Island's international personality does not mean that the Cook Island is, in constitutional terms, an independent sovereign state.*[21]

Eisini tað, at Charles kongur er statsleiðari í sínum leikluti sum kongur í Nýsælandi,[22] og ikki hevur sjálvstøðugt kongaheiti har, vísir seg at hava týdning. Cookoyggjar eru eitt nú ikki sjálvstøðugur limur í Commonwealth of Nations og sambært *letters patent*, sum regulerar umboðið hjá konginum í Nýsælandi, Governor-General, so umfatar *Our Realm of New Zealand* millum annað Cookoyggjar.[23] Hugtakið *realm,* tá ið tað kemur til kongin, er vanliga ein tilvísing til teir sjálvstøðugu statirnar, ið hann er statsleiðari fyri, eitt nú Avstralia, Nýsæland og Canada.

Sæð frá føroyskum sjónarmiði er tað áhugavert, at Danmark í 2006 viðurkendi Cookoyggjar sum ein stat. Í bókini *Moderne Folkeret* undrast altjóðarættarserfrøðingurin Ole Spiermann á hesa viðurkenning, tí at Cookoyggjar, sambært honum, ikki krevja slíka viðurkenning.[24]

3.2 Niue

Hóast tey viðkomandi løgfrøðiligu skjølini viðvíkjandi Niue eru nærum identisk við tey hjá Cookoyggjum, so eru tað onkrir munir millum tey bæði londini. Serliga er hetta orsakað av tí heilt lítla fólkatalinum hjá Niue, sum liggur um 1600 fólk ella so.[25] Hetta ger, at Niue er meira heft at Nýsælandi, enn Cookoyggjar eru. Tað sæst millum annað aftur í onkrum ásetingum sum Niue Constitution Act hevur, ið ikki eru at finna í Cook Islands Constitution Act. Serliga § 7 ið ljóðar so:

21 *Letters Patent Constituting the Office of Governor-General of New Zealand*, 1983, from: www.legislation.govt.nz/regulation/public/1983/0225/latest/whole.html (Seinast vitjað 14.11.2022)

22 Hann er ikki sjálvstøðugt kongur á Cookoyggjum, men bert sum liður í hansara leikluti sum kongur í Nýsælandi.

23 Sí fótnotu 24.

24 Ole Spiermann, *Moderne Folkeret*, 3. omarbejdede udgave, Jurist- og Økonomforbundets forlag, 2006, s. 199. Serliga nota 44.

25 www.worldometers.info/world-population/niue-population/ (Seinast vitjað 12.11.2022)

> *It shall be a continuing responsibility of the Government of New Zealand to provide necessary economic and administrative assistance to Niue.*[26]

Tað er ivasamt, um hendan ásetingin broytir støðuna hjá Niue eftir altjóða rætti. Tó skal sigast, at av praktiskum ávum handlar Nýsæland oftari vegna Niue á uttanríkisøkinum, meðan Cookoyggjar handla fyri tað mesta egna vegna. Hetta kann fatast, sum um Niue ikki hevur tað neyðugu heimildina til at handla í millumtjóða viðurskiftum, men hetta er at misskilja Montevideo sáttmálan við tað, at førleiki í tí samanhanginum bert merkir tann løgfrøðiligi rætturin at innganga í sáttmálar og gerast limur í altjóða felagsskapum. Tann rætturin hjá Niue er óavmarkaður, og Nýsæland kann bert handla uttanríkispolitiskt teirra vegna, og við teirra samtykki.

4. Greining og niðurstøða

Eru Cookoyggjar og Niue statir? Tað er ikki ein lættur spurningur at svara. Fyri at gera spurningin einfaldari, er neyðugt at hava nakrar skilnaðir í huga. Ein slíkur skilnaður er skilnaðurin millum altjóða lóg og innlendislóg. Spurningurin um støðuna hjá Cookoyggjum og Niue kann hava ymiskt svar, alt eftir hvør samanhangurin er. Altjóða rættur tekur ikki beinleiðis støðu til innanhýsis stjórnarættarligu viðurskiftini í teimum einstøku statunum. Statirnir eru í stóran mun frælsir at skipa seg, sum teimum lystir og at velja tær politisku og stjórnarættarligu skipanirnar, teir hava hug til. Hetta er ein beinleiðis avleiðing av teirra fullveldi.

Hetta hevur so aftur við sær, at statir kunnu skipa seg stjórnarrættarliga á ein hátt, ið hevur avbjóðingar við sær fyri altjóða rætt.

Annar týðandi skilnaður er tann væl kendi skilnaðurin millum *de jure* og *de facto*. *De jure* lýsir viðurskifti frá einum formligum sjónarhorni. Hvat sigur lógin um hvussu viðurskiftini eru? *De facto* vísír hinvegin til, hvussu viðurskifti virka í roynd og veru.

26 *Niue Constitution Act 1974*, frá: www.legislation.govt.nz/act/public/1974/0042/latest/whole.html#DLM412778 (Seinast vitjað 14.11.2022)

Við hesum báðum skilnaðunum í huga kunnu vit deila spurningin í hesari greinini í fýra undirspurningar fyri hvønn av Cookoyggjum og Niue:

1. Eru teir *de jure* statir sambært altjóðarætti?
2. Eru teir *de facto* statir sambært altjóðarætti?
3. Eru teir *de jure* statir, tá ið tað kemur til Nýsælendskan stjórnarrætt?
4. Eru teir *de facto* statir, tá ið tað kemur til Nýsælendskan stjórnarrætt?

Tað, ið ger fyrsta spurningin so truplan, er, tað sertaka stjórnarrættarliga sambandið londini bæði hava við Nýsæland. Í veruleikanum er ongin beinleiðis samanbarilig skipan.[27] Grundað á dynamisku rættarskipanina, Nýsæland hevur *arvað* úr Stórabretlandi, er sjálvræðið hjá Cookoyggjum og Niue vaksið munandi, síðani skipanin við frælsum felagsskapi varð innførd.

Um spurningurin varð settur í 1965, er ongin ivi um, at svarið hevði verið, at Cookoyggjar ikki eru ein statur, hvørki *de facto* ella *de jure*. Tað er áhugavert, at allar broytingarnar síðani eru hendar, uttan at karmalógin, *Cook Islands Constitution Act,* er broytt við einum orði.

Hesar broytingarnar hava ført við sær, at Cookoyggjar og Niue nú mugu metast sum *de facto* statir. Londini bæði hava øll rættindi, alt vald og allar skyldur, ið statir hava.

Hvør er so støðan *de jure*? Svarið til tann spurningin valdast, um útgangsstøði verður tikið í *deklaratorisku* fatanini ella *konstitutivu* fatanini av týdninginum av viðurkenning av statum. Sambært deklaratorisku fatanini er avgerandi fyri, um eitt løgdømi kann roknast sum ein statur, at tað livir upp til nakrar objektivar treytir. Cookoyggjar og Niue liva upp til allar vanligu treytirnar, ið settar hava verið.

Um vit taka Montevideo sáttmálan sum dømi, so hava Cookoyggjar og Niue fastbúgvandi fólk, skilmarka umveldi og eina stjórn, sum er før fyri at taka sær av uttanríkisviðurskiftum. Harumframt er ongin ivi, um at skipanin við frælsum felagsskapi millum ávíkavist Cookoyggjar og Niue og Nýsæland er stovnsett lógliga bæði eftir Nýsælendskum stjórnarrætti og eftir altjóða rætti. Skipanin

27 Tað tættasta er skipanin við frælsum felagsskapi sum Mikronesiasamveldi, Palau og Marshalloyggjar hava við USA. Hesi londini eru tó uttan iva statir, hava egnan ríkisborgararætt og eru limir í ST. Harumframt eru teirra viðurskifti við USA regulerað í sáttmálum.

er insett við Nýsælendskari lóg[28] og er hareftir góðkend av ST-aðalfundinum.[29] Tað er ongin triði statur, ið ger krav upp á umveldið hjá Cookoyggjum ella Niue.

Uttanríkisheimildirnar hjá Cookoyggjum og Niue skilja londini frá eitt nú statum í samveldisskipanum sum í USA. Sostatt mugu Cookoyggjar og Niue metast sum statir eftir *deklaratorisku* fatanini.

Tað, at hesi londini bæði deila ríkisborgararætt við Nýsæland, er ein praktisk fyriskipan, og er eitt mál fyri teirra innanýsis stjórnarrætt. Í sjálvum sær kann hetta ikki sigast at skala teirra støðu sum statur. Tó má ríkisborgaraskapur metast sum ein týðandi eginleiki við einum stati. Tað mest ivasama við støðuni hjá hesum báðum londunum er ikki, at allir íbúgvarnir hava Nýsælendskan ríkisborgararætt, men heldur at teir ikki eisini hava egnan ríkisborgararætt. Tað skal tó sigast, at londini hava fult ræði á sínum útlendingapolitikki, og taka einsamøll avgerð um, hvørjum tey loyva inn á sítt umveldi.

Formliga heitið á teirra statsleiðara broytir heldur ikki viðurskiftini, tí at hetta er ikki regulerað í altjóðarætti. Andorra er eitt annað dømi um eitt land við einari serligari skipan, tá ið talan er um statsleiðarar. Andorra hevur tvey statsyvirhøvd við tað, at forsetin í Fraklandi og ein spanskur bispur eru samprinsar í Andorra.[30] Hetta er ikki ein spurningur um altjóðarætt. Ein meginregla í altjóðarætti er júst, at statir kunnu skipa seg sum teir hava hug. Sostatt kann hetta í sjálvum sær ikki føra til aðra niðurstøðu, enn at londini bæði eru statir.

Hvat so við konstitutivu fatanini? Cookoyggjar og Niue hava ikki formligar yvirlýsingar um viðurkenning frá øðrum statum.[31] Men tey hava diplomatisk sambond við nógv lond, og hava í egnum navni inngingið sáttmálar við nógv lond. Hetta er ein óbeinleiðis viðurkenning av londunum sum statir. Tað er áhugavert, at eitt av londunum, tey hava gjørt sáttmálar við, og hava diplomatiskt samband við, er Nýsæland.

Spurningurin gerst so, hvussu umfatandi viðurkenning mann kann krevja eftir konstitutivu fatanini fyri, at ein statur kann sigast at vera vorðin til sum úrslit

28 Sí fótnotu 16.

29 Sí fótnotu 15.

30 Sí § 43 í grundlógini hjá Andorra, tøk her: www.andorramania.com/constit_gb.htm (Seinast vitjað 02.12.2022)

31 Danmark er at síggja til eitt undantak við tað, at Danmark sambært Ole Spiermann viðurkendi Cookoyggjar sum stat í 2006. Sí Ole Spierman, *Moderne Folkeret*, 3. omarbejdede udgave, Jurist- og Økonomforbundets forlag, 2006, s.199. Serliga fótnotu 44 á nevndu síðu.

av viðurkenningunum og um Cookoyggjar og Niue koma upp um hesa gáttina. Avgerandi fyri hetta er, hvussu vit skulu tulka tað, at summi lond ikki hava inngingið sáttmálar ella diplomatiskt samband við tey. Tað er trupult at lesa ein politikk burtur úr, hvat lond ikki gera. Tað er væl hugsandi, at lond, sum enn ikki hava gjørt hetta, ikki hava havt høvið til tess. Hetta merkir ikki neyðturviliga, at tey ikki viðurkenna Cookoyggjar og Niue sum statir. Um so er, er tað niðurstøðan eftir konstitivu fatanini, at Cookoyggjar og Niue eru statir eftir altjóðarætti.

Viðvíkjandi triðja og fjórða spurninginum gera somu *de facto* viðurskiftini seg galdandi fyri bæði altjóða rætt og stjórnarrætt. Sostatt má einhvør, ið heldur upp á at londini ikki eru *de facto* statir eftir stjórnarrætti, grundgeva fyri, hví metingin skal vera øðrvísi, enn eftir altjóðarætti.

De jure støðan eftir stjórnarrætti er heldur truplari at greina. Sum áður nevnt eru Cookoyggjar og Niue partur av sokallaða *Realm of New Zealand* og hevur henda eindin felags statsleiðara og ríkisborgararætt. Hesi viðurskiftini fingu Nýsælendska uttanríkisráðið at siga, at Cookoyggjar ikki eru *in constitutional terms, an independent sovereign state*.[32]

Givið at stjórnirnar á Cookoyggjum og Niue ikki hava sett seg upp ímóti hesi fatanini, er mest náttúrliga niðurstøðan, at tá ið tað kemur til innanhýsis stjórnarrættin hjá *Realm of New Zealand*, eru Cookoyggjar og Niue ikki at meta sum sjálvstøðugir statir. Men sum *Letters Patent* vísir, eru tey tó at meta sum sjálvstýrandi statir. Júst hvør munurin er millum hesi bæði hugtøkini er uttan fyri rásarúmið á hesi greinini.

32 Tað sama má metast at galda fyri Niue.